Vikuskiftis Sosialurin



# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK
TLF 341800

*– Irak-kríggið hevur gjørt, at veljararnir hava gloymt alt tað rætta, sum vit hava gjørt*

*(bretskur ráðharri).*

## STUTT SAGT

### Játtaði seg sekan

Tann 24 ára gamli amerikanski hermaðurin Paul Cortez hevur viðgingið, at hann var við til at neyðtaka eina irakska gentu í bygdini Mahmoudiyah tann 12. mars í fjør. Aftan á neyðtøkuna skutu hann og felagarnir gentuna, eina yngri systir hennata og foreldur teirra. Verjin hjá Paul Cortez sigur, at hermaðurin hevur játtað seg sekan fyri at sleppa undan deyðadómi. Ein felagi hansara, tann 23 ára gamli James Barker, hevur fyrr fingið lívlanga fongsulsrevsing í sama máli. Hann játtaði seg eisini sekan.

### Stoiber fer frá



*Edmund Stoiber*

Edmund Stoiber, sum er formaður í týska stjórnarflokkinum CSU, kunngjørdi í gjár, at hann stillar ikki uppaftur, tá formansval verður í flokkinum tann 30. september. Orsøkin til avgerð hansara er, at leysatíðindi vilja vera við, at floksleiðslan njósnaðist ímóti einum av tinglimum floksins, sum hevði funnist at Stoiber og hinum í leiðsluni. Endamálið við njósningini skal hava verið at spinna onkra søgu um privatlívið hjá tingliminum.

### Nógvar fosturtøkur

Nýggj hagtøl hjá norsku heilsumyndugleikunum vísa, at meiri enn helmingurin av teimum yngru kvinnunum í Oslo, sum gerast við barn, velja at taka fostrið. Tølini umfata bara kvinnur av norskum uppruna, og sum eru yngri enn 25 ár. Somu tøl vísa, at árliga fáa umleið 14.000 norskar kvinnur fosturtøku, og at tað eru yvirhøvur ungar kvinnur í Oslo og norðuri í Finnmørkini, sum velja at taka fostrið.

# Illveður í Evropa



**38 fólk, teirra millum tvey smábørn, lótu lív í illveðrinum, sum herjaði stórar partar av Norðurevropa í gjár**

Illveðrið stóðst av einum djúpum lágtrýsti, sum kom uttan úr Atlantshavinum, og sum elvdi til nógvan vind í Onglandi, Norðurfraklandi, Niðurlondum, Belgia og Týsklandi. Har suðuri í Danmark var eisini nógvur vindur, og á oyggjunum úti fyri suðurjútsku strondini kom vindferðin væl upp um 30 metrar um sekundið.

Illveðrið gjørdi serliga stóran skaða í Onglandi, har tólv fólk doyðu. Teirra millum var eitt tvey ára gamalt barn, sum kom at liggja undir einum veggi, sum rapaði. Nógv trø fóru um koll og duttu niður á vegir og jarnbreytir, og tað órógvaði ferðsluna nógv. Nógvir elsteyrar fóru eisini, og fleiri túsund húsarhald høvdu framvegis ongan streym í morgun.

Í Ermasundi kom eitt farmaskip í havsneyð. Manningin, sum taldi 26, gjørdi av at fara av skipinum, og tað eydnaðist tyrlum at bjarga teimum. Myndugleikarnir siga, at farmaskipið, sum flýtur enn, er fermst við spreingievni og ymsum evnafrøðiligum løði.

Í Niðurlondum kravdi illveðrið fimm mannalív. Teirra millum var ein ellivu ára gamal drongur, sum feyk á ein bil. Í Týsklandi doyðu sjey, teirra millum eitt átjan mánaðir gamalt barn, sum fekk eina hurð oman yvir seg. Í Týsklandi var vindurin so nógvur, at fyri fyrstu ferð nakrantíð bleiv øll tokferðsla avlýst.

Í øllum londunum noyddust loftferðslumyndugleikarnir at avlýsa nógvar flogferðir, og toksambandið tvørtur um Ermasund varð eisini steðgað. Í morgun koyrdu tokini aftur sum vant.

Illveðrið helt fram inn yvir Miðevropa, og bretsku veðurmenninir søgdu í gjár, at veðrið kundi blíva uppaftur verri har. Í morgun høvdu umleið 20.000 húski í Eysturríki ongan streym, tí elveitingin var farin av vindinum.

# Eiga at viðganga mistøkini

**Fýra ráðharrar í bretsku stjórnini mæla stjórnarflokkinum til at viðganga síni mistøk í sambandi við Irak-kríggið**

Teir fýra ráðharrarnir siga, at skal Labour endurvinna álitið frá bretska fólkinum, noyðist flokkurin at viðganga, at mistøk eru gjørd í sambandi við bretsku luttøkuna í Irak-krígnum.

Ráðharrarnir siga, at stjórnin gjørdi fleiri mistøk, tá hon gjørdi av at stuðla USA í at gera innrás í Irak í 2003. Hilary Benn, menningarráðharri, sigur við The Guardian, at tað var skeivt av Bretlandi at taka lut í innrásini uttan at hava minsta prógv fyri, at Irak veruliga hevði hópoyðingarvápn.

– Vit eiga at taka í egnan barm, viðganga mistøkini og læra av teimum, sigur Hilary benn við blaðið.

Ein annar ráðharri, Peter Hain, sigur, at stjórnin legði alt ov stóran dent á at hava góð viðurskifti við tann mest høgravenda amerikanska forsetan í nýggjari tíð, og kríggið í Irak hevur gjørt, at bretska fólkið hevur gloymt alt tað rætta, sum vit hava gjørt aðrastaðni, skrivar hann í tíðarritinum New Statesman.

Tveir aðrir ráðharrar, James Purnell og Yvette Cooper, hava fyrr sagt, at Labour eigur at viðganga mistøkini í sambandi við kríggið í Irak.